## Brøndby nýtti ólógligan spælara

Í Viasat Cup, sum donsku feløgini spældu seint í vár, er Brøndby nú dømt at tapa dyst á skrivaraborðinum. Dysturin hja´Brøndbby móti Esbjerg endaði annars við 2-2 javnleiki. Málini hjá Brøndby vórðu bæði skotin av David Williams, men hesin er ikki skrásettur hjá Brøndby í vaksnamannarøðini. Og tað hevur nú havt við sær, at Brøndby er dømt at tapa dystin.

**-mørk**

## Tvey HM-met til Sveis

Hóast sveisiska landsliðið vónbrotnir máttu fara heim, tá teir taptu brotssparkskapping fyri Spania, so høvdu teir tó tvey met við sær í viðføринum.

Fyrst og fremst, so er Sveis fyrsta landið, sum er farið úr einum HM-endaspælið uttan at eitt tað einasta mál er skotið móti teimum. Hartil setti Sveis eisini met í brotssparkskappingini móti Ukraina. Sveis er nevnliga einasta landið, sum ikki hevur skorað í eini brotssparkskapping í HM, so tað metið var kanska minni imponerandi.

**-mørk**

# Kravið er full úrtøka

**Bæði í Klaksvík og Gøtu kenna teir trýst á sær at fáa trý stig, eftir at tað seinast ikki eydnaðist at fáa meiri enn eitt stig á heimavølli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Í kvøld klokkan 18.30 fara GÍ og KÍ at spæla landskappingardyst í Gøtu. Hetta er sambært kappingarskipanina. Dysturin er í 17. umfari og verður spældur nú, tí GÍ 11. juli fer av landinum í UEFA Cup ørindum. Teir skulu spæla í Letlandi.

Tað er sól og heiður himin, og í Gøtu rokna teir við nógvum fólki í kvøld.

– Kravið hjá okkum eru trý stig á heimavølli, um vit skulu standa okkum í oddastríðnum. Serliga tá ið vit bara megnaðu javnleik á heimavølli móti NSÍ staðfestir GÍ veteranurin Magni Jarnskor. Í Gøtu eru allir spælararnir tøkir uttan Hans Jørgen Djurhuus, sum er leikbannaður.

Tað hevur ljóðað, at Magni Jarnskor, Sam Jacobsen og Áslakur R. Petersen eisini skuldu vera leikbannaðir. Tað verða teir næstu ferð, teir fáa kort. Kontan hjá øllum vísir fýra gul kort.

Kaj Ennigarð breyt bein í hondini ímóti NSÍ. Hondin er ikki gipsað, men løgd í skinnara, og stinni verjuspælarin hevur vant í vikuni og verður í miðverjuni í kvøld.

Eins og sunnudagin ímóti NSÍ, so kendu gøtumenn tað sum um, at teir høvdu vunnið eitt stig, tá ið teir 21. mai og í 9. umfari í Klaksvík javnaðu til 1-1 í síðstu løtu.

Hjá klaksvíkingum var hetta eitt av fleiri vónbrotum. Á heimavølli hava teir seinastu ferðirnar dyggiliga tapt móti B68 og bara fingið eitt stig burturúr móti HB, eftir at teir vóru frammanfyri við tveimum málum. Málleysi javnleikurin í Fuglafirði var eisini stórt vónbrot.

– Skulu vit hugsa um at hava samband við GÍ og hini oddaliðini, so mugu vit vinna í kvøld, staðfestir Atli Danielsen, sum móti HB var á miðvøllinum fyri fyrstu ferð í ár.

Allir klaksvíkingarnir eru tøkir. Yngstu menninir í hópinum hava ikki átt serligan leiklut seinastu ferðirnar, og tað fara teir neyvan heldur at fáa í kvøld. Kristoffur Jacobsen, Stefan Kalsø og eykamálverjin Mathias Samuelsen spældu steypafinalu í unglingadeildini í gjárkvøldið.

Petur Reinert verður dómari í Gøtu í kvøld.



*Talan er um framskundaðan dyst úr 17. umfarinum, sum verður spældur í Gøtu í kvøld*





Hvønn dag í juni mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 5. juli kl. 10.00 og merkið bjálvan »Sudoku«.

Vinningurin er bilpakkatúrur fyri 4 fólk til Bergen og aftur frá Smyril Line, virði umleið kr. 8.000,-.

Drigið verður fyrstu vikuna í juli.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar vera loystar.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50
BOOKING@SMYRIL-LINE.FO
WWW.SMYRIL-LINE.FO


## JUNI KAPPING

## SUDOKU

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | | 8 | | | 6 | | | 7 |
| | 6 | | 4 | | 2 | 5 | 8 | |
| | 5 | | | 1 | | | | 9 |
| 8 | 1 | | | 9 | | | 5 | |
| | | 5 | 1 | | 3 | 4 | | |
| | 9 | | | 8 | | | 7 | 6 |
| 4 | | | | 6 | | | 3 | |
| | 2 | 7 | 8 | | 5 | | 6 | |
| 5 | | | 7 | | | 8 | | 1 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 9 | | 7 | 1 | 6 | | | 3 |
| | | | 5 | | 9 | | | |
| 2 | | | 3 | | | 6 | | |
| 9 | 3 | 6 | | | | 1 | | |
| | | | | | | | | |
| | | 1 | | | | 8 | 5 | 9 |
| | | 4 | | | 3 | | | 1 |
| | | | 1 | | 7 | | | |
| 1 | | | 4 | 9 | 8 | | 2 | 7 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 7 | 4 | 2 | | |
| | | | 3 | 9 | | 1 | | |
| 7 | 5 | | 1 | | | | | |
| 5 | | | | | | 6 | 1 | |
| 9 | 2 | | | | | | 3 | 4 |
| | 8 | 4 | | | | | | 7 |
| | | | | | 8 | | 4 | 9 |
| | | 3 | | 6 | 7 | | | |
| | | 5 | 2 | 4 | | | | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | 1 | | | | 3 | | | |
| | | | | | | | 2 | 5 |
| | | 9 | | | | | | |
| | | 1 | 7 | | | | 6 | 9 |
| | 3 | | 5 | | 2 | | 4 | |
| 9 | 2 | | | | 1 | 8 | | |
| | | | | | | 9 | | |
| 5 | 6 | | | | | | | |
| | | | 2 | | | | 1 | 8 |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

TELEFON: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin